

# Vælkomin á ólavsøku, øll somul!

**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri*

Tað kundi verið áhugavert at vitað, hvussu fyrsta ólavsøkurøðan ljóðaði. Helst eru fólk boðin vælkomin til Havnar, og helst hevur verið staðfest, at Havnin á ymsan hátt var ein miðdepil, geografiskt, politiskt og samskiftisliga. Hóast vit vita, at Havnin vaks úr armóð og fátækt, so var hon so vælsignað væl egnað frá Skaparans hond, at fólk settu seg niður her, hóast livikorini vóru avbera vánalig.

Í túsund ár hava føroyingar, sum teir einastu í Norðurlondum, hildið hátíð fyri sameiningini av politikki og kristindómi á deyðadegi Ólavs Heilaga. Enn í dag verður ólavsøkan hildin í Havn, tá tingmenn, kirkjumenn og høgir embætismenn ganga í skrúðgongu úr Løgtingshúsinum oman í Dómkirkjuna til gudstænastu og niðan aftur í Løgtingið, sum verður sett hvørt ár á ólavsøku.

Vit vita frá gomlum keldum, at nógv fólk kom til Havnar á ólavsøku, og enn í dag savnast fólk úr øllum heraðshornum at halda tjóðarhátíð okkara. Í dag savnast vit ikki bara, tí politiska og kirkjuliga valdið hevur sæti í høvuðsstaðnum, men eiisni, tí vit hava ein verdugan høvuðsstað, ein miðdepil, sum hevur lutfalsliga nógv at bjóða. Í dag er ólavsøkan ein fólkaveitsla við breiðari undirtøku kring landið alt.

Tað er okkara vón, at Havnin enn eina ferð verður góður karmur um ólavsøkuna. Túsundtals fólk hava lagt eitt risastórt arbeiði í at gera okkara tjóðarhátíð so góða, ríka, spennandi, stuttliga og undirhaldandi sum gjørligt, samstundis sum vit leggja gerandisdagin frá okkum eina løtu og njóta samanhaldið.

Úr bygd og bý streyma føroyingar til Havnar, og floymur av útlendskum vitjandi leggur leiðina higar hátíðardagarnar, og øll skulu tey kenna seg heima í Havn. Tey eru mong, ið hava gjørt eitt stórt sjálvboðið arbeiði fyri at hugna so væl um okkum hátíðardagarnar, og teimum vil eg takka hjartaliga.

*Vælkomin á ólavsøku, øll somul!*

